# Heilsu- og innlendismálaráðið

Dagfesting: 05.03.2018
Mál nr.: 16/00141
Málsviðgjørt: pj

**Fylgiskjal 1**

## Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| Galdandi orðingar | Løgtingslógaruppskotið |
|---|---|
| **§ 9.** Loyvi krevst frá landsstýrismanninum til netvirksemi, t.e. flutningur av ravmagni, frá framleiðslustaði til brúkara. Loyvið verður latið við treytum, ið landsstýrismaðurin ásetir.<br><br>*Stk. 2.* SEV fær loyvi til netvirksemi eftir stk. 1.<br><br>*Stk. 3.* SEV skal íbinda til netvirksemi eftir stk. 1.<br><br>*Stk. 4.* SEV hevur skyldu at binda allar brúkarar av ravmagni í netið, um ikki serlig viðurskifti gera seg galdandi.<br><br>*Stk. 5.* Tá SEV ásetir prísir fyri ravmagn til brúkara, skal munur ikki gerast á, hvar brúkari býr. | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, sum broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 20. november 2007, § 10 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008 og løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2012, verður í § 9 sum stk. 6 sett:<br><br>"*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin verður heimilaður at góðkenna, at SEV kann áseta serligan prís fyri elnýtslu til góðkendar hitapumpur sambært BK17 og til elbilar.<br>1) Munurin millum serliga prísin eftir stk. 6 upp til hægsta prís fyri kWt eftir prísskránni hjá SEV kann í mesta lagi vera 0,40 kr. umframt meirvirðisgjald.<br>2) Serligi prísurin eftir stk. 6 kann verða givin fyri nýtslu alt døgnið og fyri nýtslu part av døgninum." |